# Hanus Bærentsen farin

Deyðan vardi meg, men at frætta deyðsboðini av Hanusi Bærentsen - vanliga nevndur Hanus á Hellu, góða vinmanni og skyldmanni mínum Ólavsøkuaftan vardi meg ikki; sera dáttliga komu hesi ófrættatíðindi mær við. Seinast eg støkk inn á gólvið hjá honum í Kvívík, tosaðu vit sum vanligt um mangt og hvat - eitt nú nær tað aftur mundi fara at liggja fyri at »taka ein kross« - spæla stýrivolt.

Vit báðir Hanus høvdu nógv saman í smádreingja- og hálvvaksnaárum okkara í Kvívík. Hóast sløk trý ár yngri var hann so væl framkomin í øllum, at vit kundu metast sum javnaldrar. Fasta tilhald okkara var inni hjá Marionnu hjá Mattasti og Jákupi mammubeiggja mínum. Har andaði alt av teirri gomlu bygdamentanini. Har var hugnaligt og friðsælt at vera. Haðan nomu vit nógv og lærdu okkum millum annað at spæla stýrivolt - eitt gamalt kortspæl ið var um at detta burtur. Har lærdi hann meg mannagongdina í talvi. Stórvegis longur kom eg ikki. Hann kom sum fráleið at vera ein av okkara góðu telvarum.

At nevna alt vit høvdu saman frá smádreingja- unglinga- vaksna- og hálvgamlaárunum hevur bara meining fyri meg. Hvør fór til sítt yrki. Eg eitt skifti sum sjómaður, seinni útvarpsmaður í 40 ár. Hanus at útbúgva seg til lækna og víðari til serlækna í ortopedi. Mong ár arbeiddi hann sum yvirlækni í Svøríki, har hann hitti Lenu, ið var sjúkrarøktarfrøðingur. Tey bæði giftust og fingu trý børn saman. Miðlingurin, Hoyni, var føddur við strekum breki, og Hanus visti, sum lækni, at hann fór ikki at liva leingi. Vit tosaðu mangan um hetta - tveir einir. Hoyni andaðist 16 ára gamal. Tað tók honum dygt, hóast hann - at síggja til - ikki lat við seg koma. Kenslurnar hevði hann fyri seg sjálvan. Tær sóust ikki uttaná.

Hanus var javnan heima í summarfrítíð síni og arbeiddi á landssjúkrahúsinum. Mong eru tey, ið hann hevur veitt hjálp fyri knø- og mjadnatrupulleikar og hava honum fyri at takka at tey hava fingið nakað av førleikanum aftur.

Tey seinastu árini síðan hann fór frá fyri aldur, hevur hann verið nógv norðuri á Klaksvíkar sjúkrahúsi og hjálpt til við at skifta knø og mjadnir.

Hanus hevði tokka til heimbygd sína; og tá hann kom heimaftur með alla, eftir at hann og Lena fóru hvør til sítt, setti hann búgv har. Góður var hann í ávikum, og mangan var leitað til hansara, tá onkur av bygdarfólkunum kendi sær okkurt at meini. Hann bar seg ongantíð undan og kravdi einki. Hann var væl við øll, og øll vóru væl við hann. Ikki av mongum orðum, men í verki. Hann verður nógv saknaður.




Heilsan var farin at bila, og nú skjótt 77 ára gamal, orkaði hann ikki longur. Nú hann varð borin út, var Kvívíkar kirkja meira enn fullsett av vinfólkum, starvsfeløgum og teimum mongu, hann hevði hjálpt og vístu honum takksemi og heiður.

Góða Tórhild! Tit fingu nógv góð ár saman. Hugnaligt var at støkka inn á gólvið hjá tykkum. Góðu Eyðgerð og Tummas! Bert er bróðirleyst bak. Tey góðu minnini eiga vit.

Hvíl í friði. - Vinmaður og skyldmaður tín.

**Ívar**

---

†

## Andlát

**Ebba Weihe**
**Runavík, f. Danielsen,**
**ættað úr Søldarfirði**

andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi fríggjadagin 20. august, 94 ára gomul.

Jarðarferðin verður týsdagin 24. august kl 14:00 úr Glyvra Kirkju.

Tey ið vilja minnast Ebbu kunnu geva eina gávu til Eysturoyar Ellis- og Røktarheim konto í peningastovnunum.

*Familjunar vegna*
**Anna og Johan Sigurd**

---

†

## Andlát

Tað verður kunngjørt fyri slekt og vinum, at okkara elskaði sonur og beiggi

**Robert Johannes Abraham Hansen**

andaðist í Sønderborg, fríggjadagin 20.08.10
32 ára gamal.
Sonur til Ingrid og Harry Hansen,
á Byrgi –Strendir

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Vegna familjuna*
**Harry Hansen**

---

## TØKK

Vit takka øllum hjartaliga, ið sýndu okkum samkenslu og hjálptu til, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jenhild Juul**

doyði og varð jarðað.

Takk fyri heilsanir, kransar, blómur og gávur til Vesturstovu.
Ein serlig tøkk til Vesturstovu fyri góða røkt og umsorgan.

*Familjunnar vegna*
***Jørmund, Dávur og Pálin***